**GOTT BINGO**
verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 5. oktober kl. 16. 12 plátur 100 kr. Drigið verður ímillum spølini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Glæman*

**GOTT BINGO**
verður í Glæmuni í Kvívík sunnudagin 22. september kl. 16. Høvuðsvinningur á lutaseðlinum er eitt lamb og gávukort á 500 kr. 12 plátur 100 kr. Drigið verður í millum spølini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Glæman*

## Bøkur

**EIGUR NAKAR BØKURNAR**
Psykologibogen og námsfrøðisbøkurnar: Skabende Virksomhed og Søndag er træls, at selja mær so ring sum skjótast.
*Tlf. 281192 ella 316552*

**TIL SØLU**
Seyðabrævið 200 kr.
*Tlf. 322942*

**TIL SØLU**
Grimberg: Verdenshistorien 16. bind 500 kr. Knut J. Krogh: Kirkjubøstólarnir og Kirkjubøur 200 kr.
*Tlf. 322942*

**SOSIALRÁÐGEVARABØKUR**
Bøkur til sosialráðgevara-útbúgvingina til sølu. Nýprísur 5.500 kr, til sølu fyri 3.000 kr.
*Tlf. 220060 ella 261862*

**NÓGVAR BÍLIGAR BØKUR**
til studentaskúlan til sølu.
*Tlf. 227116 ella 319754 eftir kl. 16*

**YNSKIST**
Er nakar, ið hevur Levende Organismer av Jens Bremer og Biologisk miniLex bíliga til sølu?
*Tlf. 313471*

## Burturm. /funnið

**HELLY HANSEN**
jakki burturblivin. Jakkin er str. M, er ljóst blá/gráur við myrkabláari strípu oman eftir ermunum. Finningarløn verður latin.
*Tlf. 264401 ella 313029*

**KAGGIN**
Fólk, ið hava gloymt klæðir í Kagganum verða biðin um at heinta tey, ella verða tey latin til vælgerandi endamál.
*Nevndin*

**BURTURMIST**
Diskmappa v/ 30-40 diskum horvin úr bilinum í summar. Veitst tú nakað um hana?
*Tlf. 224760 - 457851*

## Býli

**HÚS TIL LEIGU**
Sethús í Vesturbýnum til leigu frá 1. oktober 2002.
*Tlf. 215969 eftir kl. 17*

**KAMAR TIL LEIGU**
í vesturbýnum við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu.
*Tlf. 221158 ella 313799*

**ÍBÚÐ Í HAVN TIL LEIGU**
Íbúð í eysturbýnum til leigu. Íbúðin er í tveimum hæddum, støddin er um 80 fermetrar. Íbúðin er í einum rekkjuhúsum í fýra hæddum, við felags inngongd. Talan er um tvær tær ovastu hæddirnar. Á niðaru hæddini er stova og køkur í einum og eitt baðiverilsi. (Alt ný ístandsett). Á ovaru hæddini er eitt stórt rúm (kamar).
*Bill.mrk. 1424-4*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Íbúð í Tórshavn ynskist. Vit eru eitt ungt par, sum leitar eftir einari íbúð í Tórshavn. Vit fara væl um, eru friðarlig og gjalda til tíðina.
*Tlf. 223181*

**SØKT VERÐUR EFTIR**
íbúð í Tórshavn skjótast gjørligt. Alt hevur áhuga.
*Tlf. 218506 ella 371587 eftir kl. 17. Niels Gunnar*

**ÍBÚÐ TIL LEIGU**
Íbúð í Havn til leigu frá 1. okt. til tvey friðarlig fólk. Stova/køkur, tvey kømur, wc v/bað. Kr. 5.500,- um mánaðin við ljós og hita. 2 mánaða leigu forút.
*Tlf. 213303 millum kl. 17-20*

**ÍBÚÐ Í KLAKSVÍK TIL SØLU**
Eigaraíbúð Undir Klakki 9B til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 217588*

**TIL LEIGU**
Einstaklings íbúð mitt í býnum – møblerað – til leigu í styttri tíðarskeið. Tilboð og upplýsingar.
*Bill.mrk. 1424*

**ÍBÚÐ YNSKIST Í KLAKSVÍK**
Lítil íbúð søkist í Klaksvík til friðarliga gentu.
*Tlf. 252695*

**HÚS VIÐ GÓÐUM ÚTSÝNI TIL LEIGU Í SUÐURSTREYMI**
Frá uml. 1. September 2002 eru eini stór hús til leigu í Suðursteymi. Møguliga við forkeypsrætti. Húsini eru innrættaði við m.a. tveimum stovum, stórum køki, trimum sovikømurum, tveimum baðiverilsum. Tilsamans uml. 145 m2. Eisini er ein óinnrættaður kjallari, uppá uml. 100 m² sum er vælegnaður sum t.d. goymslurúm. Húsini hava eisini stóra altan við carport undir. Húsini liggja í sera barnavinarligum umhvørvi har stutt er til bæði vøggustovu/barnagarð og skúla. Útsýni er avbera gott. Góðir parkeringmøguleikar. Eini hús við nógvum møguleikum. Depositum verður kravt.
*Áhugað ringið 26 71 85*

**KAMAR ELLA ÍBÚÐ SØKIST**
Ungur lærlingur av bygd, sum hvørki roykir ella drekkur, søkir kamar ella íbúð í Tórshavn, við atgongd til køk og bað.
*Tlf. 361776 el. 228363*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Mamma við tveimum børnum ynskir íbúð til leigu í Havn skjótast møguligt, helst áðrenn des. Fari væl um og gjaldi rættstundis.
*Tlf. 311562 / 254422, Kristina*

**INNIVIST Í KEYPMANNAHAVN**
Er nakar, sum hevur eina íbúð/kømur at leiga okkum frá 22. til 29. sept. í Keypmannahavn? Vit eru 5 damur
*Tlf. 320340 - 221952*

**LÍTIL ÍBÚÐ YNSKIST**
Søkt verður eftir lítlari íbúð til friðaliga kvinnu, í umráðnum Leynar/Stykkið/Kvívík. Prísur helst ikki omanfyri 2.500,- við ljós og hita.
*Tlf. 261585 eftir kl. 16*

**ÍBÚÐ ELLA LÍTIL HÚS**
ynskjast til leigu – 2 kømur, køk, stova, wc/brúsu – frá 1. oktober, helst í høvuðsstaðarøkinum. Um tað krevur ábøtur, so klára vit tað. Vit eru 2 fólk í seinnu helvt av fimtiárunum, fáa pensjón, fara væl um.
*Tlf. 322762 ella 221913*

**HJÁLP!**
Eg eri ein einlig mamma við 2 dreingjum, sum søki eina íbúð ella hús til leigu fyri ein rímiligan prís. Dreingirnir eru 11-12 ára gamlir. Ring á 319684 ella 263830 ella sendi eitt mail til
*eyl@kallnet.fo*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Einligur ungur handicappaður maður ynskir íbúð í Havn, á Argjum ella í Hoyvík skjótast til ber.
*Tlf. 421531 ella 258761*

**KAMAR YNSKIST**
Sjómaður við føstum arbeiði søkir eftir kamari við atgongd til køk og wc. E-mail: rudolfo@post.olivant.fo
*Tlf. 218044, Rudolfo Castro*

**HEY TIT**
Ein edrúuligur og friðaligur persónur í miðal aldri søkir eina fitta íbúð, góð leiga kann gjaldast. Um tit hava eina, so hopi eg at frætta frá tykkum á
*bill. mrk. 1421*

**HÚS TIL LEIGU**
Stór møblerað hús til leigu. Hittist best eftir kl. 21 um kvøldið.
*Tlf. 313339*

**ÍBÚÐ TIL LEIGU**
á Argjum frá 1. okt. Stova/køkur, tvey kømur, wc v/ bað, hjallur og óinnrættað loft. Skriva til
*sinnop@hotmail.com*

**HÚS ELLA ÍBÚÐ YNSKIST**
til leigu í Havn.
*Tlf. 319587*

**HEY!**
Vit eru eitt par, ið leitar eftir íbúð í Tórshavn. Byrja í skúla seinast í hesum. Eru sera friðarlig og gjalda til tíðina.
*Tlf. 373406*

**ÍBÚÐ**
Eg og 4 ára gamla dóttur mín ynskja lítla íbúð til leigu í Tórshavnar kommunu. Fara væl um, havi fast starv og royki ikki.
*Tlf. 228811, arb. 314600 (9.00-17.00), Sólvá*

**SKRIVSTOVUHØLI**
til leigu í miðbýnum 283 fermetrar.
*Bill.mrk. 1318-2*

**SKÁLAVÍK**
Nýggjari frítíðarhús til leigu, sum standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava sentralhita.Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~debes E-postur: debes@post.olivant.fo
*Tlf. 311197*

## Dansur

**FØROYSKUR DANSUR**
Norðstreymoyar Dansifelag bjóðar øllum dansifeløgum og dansiáhugaðum í Bygdarhúsið í Kollafirði leygardagin 28. sept. kl. 21.00. Kostnaður 50 kr.
*Norðstreymoyar Dansifelag*

## Dýr

**TIL SØLU**
2 tarvskálvar, 1 mðr. gamlir.
*Tlf. 218101*

**BÚR YNSKIST**
Búr til marsvín ynskist bíliga til keyps.
*Tlf. 315613*

## Fundir

**PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN**
kemur saman mikukvøldið 18. sept. kl. 19.00 í Losjuni, Tinghúsvegur 18, til hugna við sangi og føroyskum dansi.
*Nevndin*

**AGLOWMØTI**
verður í Stranda Sentrum leygardagin 14. sept. kl. 15. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.
*AGLOW*

**FRÁ FELAGNUM PINKUBARNADEYÐI**
Vit møtast í kantinuni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi leygardagin 14.09.02 klokkan 15. Øll eru hjartaliga vælkomin. Eisini Eysturoyingar.
*Felagið Pinkubarnadeyði*

## Húsarhaldstól

**TIL SØLU**
Ein komfýrur av slagnum Whirlpool við leysum kóki-plátum at seta niður í borðplátu uml. 1/2 ára gamal til sølu fyri 2000 kr., og ein uppvaskimaskina av slagnum Miéle Automatic G579SC til sølu fyri 2000 kr. Selist samlað fyri 3500 kr. Áhugaði kunnu ringja til
*tlf. 319540 millum kl. 08.00 og 16.00*

**WHIRLPOOL**
AWM 256 vaskimaskina, 1000 snúðingar, kr. 3.000,- Gorenje køli-/frystiskáp KF 2866 kr. 2.500,- Kervel 3000 UG Mini-ovnur 30 l. kr. 2.000,-
*Tlf. 314068*

**TURKITRUMLA**
Brúkt turkitrumla til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 311327*

**FRYSTIBOKS TIL SØLU**
Stór frystiboks bíliga til sølu.
*Tlf. 284408*

**KØLISKÁP**
við frystiboks til sølu. Merki: Iberna. Prísur kr. 1.000,- (Nýprísur í aug. 2001 var kr. 2.200,-)
*Tlf. 445148*

**EIN**
»de luxe« turkitrumla, sum er lítið brúkt, bíliga til sølu.
*Tlf. 312590*

## Innbúgv

**HORNASOFA**
Beige/brún melerað, ein stólur + 1 myrkt sofaborð til sølu fyri 2.500 kr.
*Tlf. 444362*

**DUPULTSONG TIL SØLU**
Brúnbeisað dupultsong 140 x 190 cm. við 2 springmadrassum + 2 náttborð.
*Tlf. 315888*

**LÚTAÐUR**
skenkur við yvirskápum til sølu.
*Tlf. 224150*

**BRÚKTIR MØBLAR**
Antikkur skenkur, útskorin frammantil (l190xh80xd60): kr.1000. Málaður dektoyskenkur (l160xh125xd45): kr. 500.
*Tlf. 212844*

**TIL SØLU**
Eik chattol nød náttborð við spegli og ein rokokostólur.
*Tlf. 310480*

**SKRIVARABORÐ**
Snøgt, lítið brúkt skrívaraborð við skuffum til sølu fyri umleið 400 kr.
*Tlf. 258744*

**TIL SØLU**
Ein vælhildin, ljósabrún 3 pers. sofa + 2 stólar bíliga til sølu.
*Tlf. 318204*

**TIL SØLU**
3 pers. sofa v/ ljósum, heilullintum betrekki, sum kann takast av, 1.500 kr. Ein 2 1/2 pers. sofa, bert 1 ára gomul, 2.000 kr.
*Tlf. 313449 ella 220537*

**TIL SØLU**
Sovibriks við tveimum skuffum, 250 kr., og koyggjusong við madrassum, stiga og pyntigardinum, 750 kr.
*Tlf. 441804 - 211804*

**BÍLIGA TIL SØLU**
Dupult sovisofa, runt, hvítt borð + fýra stólar, gongsmøbil: kommoda + spegl.
*Tlf. 223035*

**TIL SØLU**
Vakurt sofaborð, sum nýtt, til sølu fyri 400 kr.
*Tlf. 321915 / 220660*

**TIL SØLU**
Fýra stólar til at sláa út (klappa saman) til sølu fyri 150 kr. íalt.
*Tlf. 321915 / 220660*

**BRÚKTIR MØBLAR**
Teak skrivaraborð: kr 200, blámálað kommoda: kr 300, bók sofaborð: kr 300, furu stólar (2). kr 100, hvítir klapstólar (2) kr 40, hornatelduborð kr 200.
*tel: 212844*

**TIL SØLU**
Bestikksett »Freia« til sølu fyri 10.000 kr. Óbrúkt.
*Tlf. 255279*

**SOVESOFA**
som kan slåes ud til 2 personer sælges for 200,-. Lille 4-personers spisebord sælges uden stole for 200,-. Sony surround højtalere sælges til 1000,-
*Tlf. 320202*

**SOFABORÐ TIL SØLU**
stødd 0,81 m x 1,28 m. hædd 49 cm. bíliga til sølu. Nýggjar træpersiennur 60 x 130 prísur: 200,- Nýprís 298,-
*Tlf. 317673 eftir kl. 18*

## Leikur

**BARBIE TIL SØLU**
10 dukkur, møblar til sovikamar, barnakamar og køk, nógv klæði til bæði vaksin og børn, umframt eina rúgvu av smálutum – 800 kr.
*Tlf. 371021*

**TIL SØLU**
Nintendo 64 v/ 2 joystikkum og 10 spølum til sølu fyri 1.500 kr.
*Tlf. 210494*

## Pløgg

**SKÓGVAR TIL SØLU**
Skógvar (óbrúktir) til sølu. Sera smartir og góðir dreingjaskógvar std. 40/41, vegna feilkeyp av std. til sølu fyri kr. 450,- (keyptir í DK fyri kr. 700,-)
*tlf. nr. 318811*

**TIL SØLU**
Sera vakur Lilly konfirmatiónskjóli str. 36 + skógvar til sølu.
*Tlf. 210494*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
Lilly konfirmatiónskjóli v/ jakka og hárprýði, str. 36. Sera vakur og einar sandálir, str. 36 til sølu fyri 1/2 prís.
*Tlf. 457626 ella 220776*

**SELSKAPSKJÓLI**
Sera vakur selskapskjóli, koksgráur, perlur broderaður framman, stødd XL. Boð undir kr. 2.000,- ongan áhuga.
*Tlf. 0045 21827606 – eri stødd í Havn*

**BUFFALO SKÓGVAR**
Buffalo skógvar, stødd 39, svartir og hvítir, óbrúktir, til sølu fyri 800,- kr, (nýprísir 1095,- kr.)
*tlf. 229116 eftir kl. 16*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
og blondujakki str. 36 til sølu fyri 800 kr. Skógvar til sølu fyri 200 kr. str. 38.
*Tlf. 267214*

**BUKSUR**
Tvey pør av floyalsbuksum til gentu, std. 146/11 ár, til sølu fyri 150 kr. parið. Buksurnar eru keyptar í Hennes & Mauritz 2/9-02.
*Tlf. 316375*

**KONFIRMATIÒNSKJÒLI**
Konfirmatiónskjóli og jakki str. 40 til sølu fyri 900 kr. Skógvar str. 39 til sølu fyri 250 kr.
*Tlf. 311364 eftir kl. 17.00*

## Samband

**SAMBAND YNSKIST**
Halló tit føroysku kvinnur. Eg eri ein maður við ungum sinni, men eg eri fyrst í 60-unum, eg leiti eftir eini fittari damu, sum eg so fegin vildi komið saman við, eg eri grúiliga róligur, og so drekki eg ikki spiritus og royki ikki. Nú vil eg spyrja, um tað ikki finst nøkur kvinna í Føroyum, sum kundi hugsað sær at komið saman við einum álítandi manni, tú sum situr áleina, hevði tað ikki verið ein loysn? Góður skal eg vera við teg. Tú sum vil skriva til mín, ikki skal tú vera bangin at skriva, tað eru nógv, men eg veit ikki hví. Set teg niður og fá nøkur orð niður á eitt pappír og send tað av stað við tíni adressu til Sosialin, Boks 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 1421/2*

## Sjavs

**SJAVSKAPPING**
verður í Mimi týskvøldið 17. sept. kl. 19.00.
*Mimir*

## Súkklur

**TIL SØLU**
Ein Aprilia RS 50 til sølu fyri 16.000 kr. Sær gott út, árg. 99.
*Tlf. 316365 ella 221583*

**YNSKIST**
26" harra fjallasúkkla ynskist til keyps, helst við 18 gearum.
*Tlf. 222126*

**DAMUSÚKKLA**
Løtt damusúkkla við gervum til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 317350*

**EIN YAMAHA FS1**
4 gear knallert bíliga til sølu. Nakað av eykadeilum fylgir eisini við (helst eftir skúlatíð)
*Tlf. 220323*

**SKUTARI**
Aprilia skutari við skaða til sølu fyri kr. 3.000,-
*Tlf. 314129*

**NIELSEN CITYBIKE**
Góð all-round súkkla við Shimano Nexus, 7 gear og øðrum 1. floks lutum til sølu fyri 4.000 kr.
*Tlf. 224213*

**YAMAHA SKUTARI**
til sølu. Árg. nov. 2001. Koyrt 3.500 km.
*Tlf. 210174*

**TIL SØLU**
Reyð Mountain Bike av merkinum Florida, 24 tumma hjól, til 8-12 ára gomul.
*Tlf. 265750 - 310188*

**SCOOTARI TIL SØLU**
Vælhildin, 2 ára gamal Aprilla RS50 scootari til sølu um gott boð fæst. Kann síggjast.
*Tlf. 315953 - 215953*

## Teldur

**TELDA TIL SØLU**
ASUS Geforce 3. 64mb. tv ut/inn. v/ 3D brillum!, Plextor cd brennari 8/4/32, SB. LIVE value við 4 SB hátalarum og subwoffer til surround sound, 512 mb RAM, 40 Gb Ibm Hd, 1000 Mhz Athlon, 10/100 bit netkort, 56 k/bit modem, Optisk mús, multifunktion knappaborð. Win xp, spøl og prog. Prísur: 7.800- (17" skermur 600 kr. eyka)
*Ring 311603*

**SPØL TIL SØLU**
Hygg her, eitt gott tilboð. Warcraft 3, Jedi outcast og warrior kings til sølu: tilsamans 400 kr., ella hvørt sær 150 kr. Ring á
*422297 spyr eftir Tóra.*

**FLATSKERMUR**
Sharp 15" TFT, klárar 1024 x 768 við 75 HZ, garanti fylgir við. Til sølu fyri 3.000 kr.
*Tlf. 314421*

**TELDA TIL SØLU**
av merkinum Vibrant við skermi, printara, skannara, 2 hátalarar. Onki brúkt. Prísur: 6.000,-
*Tlf. 255279*

**TELDA TIL SØLU**
Pentium 3 / 750 Mhz CPU, 512 MB Ram, 64 MB Grafikkort, 20 Gb Harddisk, SoundBlaster ljóðkort, 10/100 Mbit netkort, 17" Philips skerm, keyboard, Logitech mús og hátalarar. Windows og spøl. Til sølu fyri 4.800,- kr.
*Tlf. 321099 - ella 220799*

**NÓGV GÓÐ**
PC-spøl – gomul og nýggj – bíliga til sølu.
*Tlf. 227737 ella 318530*

**JOYSTIK TIL NINTENDO 64**
Joystikk til Nintendo 64 ynskjast til keyps.
*Tlf. 444348, Una*

**TIL SØLU**
Ein Siemens Fujitsu telda, 600 MhZ, 20 GB harddisk, 32 MB grafikkort, DVD og brennari, 17" skerm. Printari fylgir við. .
*Ring á tlf 313790, 220405*

## Tónleikur

**KONTROLPULTUR TIL SØLU**
Ein 24 spor kontrolpultur av slagnum Joker, har 8 tey fyrstu sporini hava innbygdan gate + 8 spor til effektir, verður seldur fyri hægsta boð. Pulturin er sum nýggjur, hevur verið nýttur í JakZac studio. Pulturin kann eisini nýtast til konsertir o.a. Áhugaði kunnu ringja til 319540 og spyrja eftir Jákup, ella síggja pultin í JakZac-studio Grønlandsvegur 38, millum kl. 08:00 og 16:00.
*Tlf. 319540, spyr eftir Jákup*

**YNSKIST TIL KEYPS**
Hi-Fi minidisk-spælari ynskist til keyps.
*Tlf. 260989*

**YNSKIST**
Brúkt klaver ynskist til keyps.
*Tlf. 448590*

**TIL SØLU**
FENDER Stratocaster mod. 27-5700 (made in Japan) 2 single-coil og 1 Humbucking pickup, sera væl hildin, til sølu um hóskandi boð fæst, mynd av guitarinum kann mailast eftir ynski.
*René - Tlf. 211438*

**YNSKIST**
Hevur nakar eina harmoniku til sølu fyri sámuligan prís?
*Tlf. 333988 ella 250240*

**EG HAVI**
danskar og útlendskar fløgur, bæði brúktar og óbrúktar. Eg leiti eftir føroyskum fløgum.
*Tlf. +45 86428627 ella +45 26747474*

## Út- & Sjónvarp

**SJÓNVARP**
Til sølu fyri bert 2.000 kr.
*Tlf. 258744*



## Ymiskt

**FELAGSKÓRIÐ GØTA/LEIRVÍK**
Vit byrja at venja týsdagin 17. sept. kl. 19.03. Nýggir sangarar eru vælkomnir.
*Felagskórið*

**NÝGGJ GARASJUHURÐ**
til sølu fyri 13.000 kr. av merkinum Crawford Euro Classic, hvít, stødd 245 x 212,5 cm. við fjarstýring. Nýprísur 17.200 kr.
*Tlf. 444465 ella 444899*

**NOKIA 8210**
+ hondfrítt sett, billadara 4 cover. Til sølu fyri 1.200,-
*Tlf. 213898 ella 313898*

**FERÐAST SAMAN?**
Er tað nakar, ið ætlar sær til Danmarkar? Fráferð úr Føroyum tann 20. okt. og heimaftur 27. okt.? So kunnu vit ferðast saman og fáa bíligan ferðaseðil. Vinarliga ring
*tlf. 448436*

**HURÐ YNSKIST**
Hevur tú eina innhurð (við glasi) Mátar : 185 x 90 cm. Onkur ringdi einaferð úr Vestmanna vinarliga ring aftur.
*Ring 317376*

**FEITASTA VENJING Í HAVN**
Kom og ven við okkum – tú verður so nógv betur fyri! Venjingin er ætlað okkum, sum stríðast við ov nógv kilo. Aerobic kombinerað við styrkivenjing. Mánadag og hósdag kl. 17.00-18.00. Gleða okkum at hoyra frá tær. Ring til
*319567, Marjun ella Sæbjørn tlf. 319039*

**EIN NOKIA 3310 TIL SØLU**
við uppládara og 5 coverum, fyri 1000 kr. Upprunaligur prísur uml. 2000 kr. Hevur tú áhuga fyri hesum, ring so til
*tel. 317948 - 217948*

**MÁLNINGUR**
Um hóskandi boð fæst, er ein málningur, sum Frimod Joensen hevur málað, til sølu.
*Tlf. 228665*

**TIL SØLU**
POWER-STEPPER (til venjing av bein- og fótliðum) ynskist til keyps.
*Ring tlf. 314977 / 254700*

**VINDEYGA**
140 x 140 cm. – óbrúkt, mahogni – til sølu. Nývirði kr. 5.000,-
*Tlf. 314129*

**VINDEYGU VIÐ TERMOGLASI**
3 vindeygu við termoglasi, 120 x 120 til sølu fyri 500,- kr. stk.
*Tlf. 0045 21827606*

**SKEIÐ**
verður hildið í okt. í gerð av kortum og myndum. Seymaði, 3 dv. ella serviettum – um nóg nógv tekna seg. Meir fæst at vita á
*tlf. 315191 ella 215191 eftir kl. 16*

**DIGITAL KAMERA**
Eitt lítið digitalt kamera til sølu fyri 450 kr. Tekur 80 myndir og kann eisini nýtast sum WEB kamera (3 mðr. gamalt) Nýprísur 800 kr.
*Ring 261196*

**SOS SOS!**
Um tú ella tit hava eitt brúkt video og Playstation hampuliga bíliga til sølu, vil eg fegin hoyra frá tykkum.
*Tlf. 443242 - 282280*

**MYNDATÓL**
1 1/2 ára gamalt Minolta Dynax 500si v/3500 xi blitzi, eini Tamron 28-300 mm. aspheriskari linsu og einum óbrúktum stativi. Nýprísur 13.500 kr., til sølu fyri einans 8000 kr.
*tlf. 260590*

**TIL SØLU**
Sony Ericsson T68i – flotta telefonin við litskermi, GPRS, kalendara, infrareyðum porti, spølum og nógvum afturat. Bert 3 mðr. gomul. Virkar perfekt. Til sølu fyri bert 3.400.
*ring 0045 51900522*

**JØRÐ Á SKARÐI!!!**
7 gyllin av jørð fyri innan á Skarði til sølu.
*Tlf. 251681*

**TIL SØLU**
Ein Benefon NMT 450 bíliga til sølu.
*Tlf. 215821*

**OLJUMÁLNINGAR TIL SØLU**
Vestara Vág av Pól Hentze. Tinganes av Pól Hentze 2002. Kavamyndir úr Sandoy, av sama.
*Tlf. 255279*

**FERÐAST SAMAN?**
Er tað nakar, ið ætlar sær til Danmarkar í oktober og steðga í Danmark í ca. 14 dagar? So kunna vit ferðast saman og fáa bíligan ferðaseðil. Vinarliga ring á
*tel. 222079, best eftir kl. 18.*

**FJARSTÝRT FLOGFAR**
til sølu fyri 800 kr. Tað er eitt sindur bygt og hevur motor. Lím og ymiskt annað fylgir við.
*Tlf. 424309, kl. 17–00*

**FLYTIGÓÐS**
Skalt tú flyta niður, so er møguleiki at fáa flytigóðs niður til DK í hesari vikuni.
*Tlf. 265245*



**Søkt verður eftir fólki**

**Vit søknast eftir einum fólki. Arbeiðið umfatar fyri tað mesta montering av rútum v.m.**

**Tó so, ein partur av arbeiðnum verður eisini at hjálpa til aðrastaðni á virkinum, tá tørvur er á tí.**

**Krøvini eru at tú ert arbeiðssamur og álítandi.**

**P/F Føroya Termovirki**
**Sundsvegur 8**
**100 Tórshavn**
**mrk.: Umsókn**

FTV GLAS
FØROYA TERMOVIRKI

# HEILSANIR



**Góði elskaði Jón**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum 14. sept. Gud signi framtíð tína, alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja omma og abbi**



**Góði elskaði Jón**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum. Alt tað besta verður ynskt tær frá
**gubba, Paulo og Kristinu**



**Gumma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum í dag.
**Ynskir Tummas**



**Góðu Bjarta, Niels og Eydna**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum, sum eru, verða og hava verið, og alt tað besta í framtíðini. Nú eru tit blivin stór.
**Ynskjir Harryet**



**Góði Petur**
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum. Túrurin var góður – her liggja vit í Rom. Bestu ynskir
**Jákup, Helena og Ingrid**



**Góði elskaði Jón**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum 14. sept. Alt tað besta framyvir. Ynskja
**Mamma, babba og diddan**



Er hann nevndur, er hann kendur. Tillukku við teim hálvthundrað. Vit gleða okkum til í kvøld.
**Starvsfelagarnir**



**Góða mostur**
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum, ið var 30. aug. All the Best. Vi ses.
**Ásvaldur & Andrias**





**Góði Galla**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Alt tað besta ynskja vit tær og tykkum øllum.
**Heilsa vit**